**SEMJA**

**MILLUM**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP**

**OG**

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**

Omanfyrinevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. mars 2025 við hesum broytingum:

Løn hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Hin 1. mars 2023 | | |
| | Lønin hækkar | 3,80 % |
| Hin 1. mars 2024 | | |
| | Lønin hækkar | 4,04 % |

**Høvuðssáttmálin**

1. §3, stk. 2 verður broytt soleiðis:

   "*Fyri arbeiði, sum maskinmeistari arbeiðir yvir 11 tímar í einum samdøgri, verður úrtíðarlønin roknað sum mánaðarlønin/173 + 25%.*"

2. Í grein 21 í høvuðssáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Maskinmeistarafelagnum verður "2021" brottt til "2023", og "2023" broytt til "2025".

   Gildiskomurnar í sersáttmálunum verða dagførdar samsvarandi.

**Sáttmálin fyri størri skip í frálandavinnu:**

3. Í grein 1, stk. 1 í frálandasáttmálanum verður henda orðing sett inn eftir verandi orðing um sáttmálafevnd:
   "*Sáttmálin er eisini galdandi fyri tænastuskip til alivinnuna, sum eru skrásett í føroysku altjóða skipaskránni.*"

4. Í sersáttmálanum fyri størri skip í frálandavinnu verður í grein 5, stk. 1 "*1. mars 2020*" broytt til "*1. mars 2024*".

5. Lønartalva fyri maskinmenn uttan siglingstíð verður sett inn í lønartalvuna fyri manning við veitingarskipum.

Nýggja lønartalvan er:

**Maskinmenn uttan siglingstíð**

**Lønartalva 1. mars 2023**

| | | Løn | Eftirløn 13% |
|---|---|---|---|
| STCW II/1 | STCW III/1 | 22.073 | 2.869 |
| | STCW III/3 | 23.006 | 2.991 |

Arbeitt verður eftir einari 1:1 skipan.

**Tórshavn, 17. februar 2023**

Fyri Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Jens Meinhard Rasmussen, formaður

Fyri Maskinmeistarafelagið

Tummas Eli Høj Joensen, formaður